## Kanningarstjórin stendur við sína frágreiðing

KANNING
*Ingi Rasmussen*

Hóast bæði umsitingin og onkur løgfrøðingur hava sátt iva um frágreiðingina hjá Turið Debes Hentze, advokati, um embætisførsluna hjá Jørgin Niclasen, so stendur hon rimmarføst við sína frágreiðing.

– Eg standi við frágreiðingina, og eg afturvísi, at eg havi tikið avgerð á ófullfíggjaðum grundarlag. Eg havi alla tíð kunnað Fiskimálaráðnum í málinum, og um nakað vantar, so er tað teirra egna ábyrgd, sigur Turið Debes Hentze, sum annars ikki vil gera fleiri viðmerkingar í málinum.

Kanningarstjórin kom til ta niðurstøðu, at Jørgin Niclasen veik frá lógini, tá lán til tveir rækjutrolarar vórðu løgd um.

Í sínum svarum hava landsstýrismaðurin og hansara umsiting ført fram, at hevði kanningarstjórin lagt høvuðsúrslitini fram fyri fyrisitingina, so høvdu nakrar misskiljingar ikki komið fyri, og úrslitið hevði verið eitt annað.

Hesum vísir Turið Debes Hentze aftur. Hon sigur, at umsitingin var væl og virðiliga kunnað um málið og hevði góðar møguleikar at gera sínar viðmerkingar.

Tað verður eisini undirbygt í einum skjali, sum Sosialurin hevur fingið innlit í.

Í einum brævi til Fiskimálaráðið, dagfest 23.05. 2002 biður Turið Debes Hentze um fleiri upplýsingar í málinum, og hon ger vart við, at svarið upp á hesar spurningar kann verða avgerandi fyri, hvat úrslitið av kanningini verður.

Síðan gevur hon eitt yvirlit yvir málið, og sigur, at »um landsstýrið hevur tilfar, sum eg ikki havi, og sum eftir landsstýrisins áskoðan broytir hesa gongd, vil eg fegin hava at vita um tað«.

Sostatt er líkt til, at Fiskimálaráðið fekk høvi at svara aftur, og fekk møguleika at beina møguligar misskiljingar av vegnum. Turið Debes Hentze heldur hinvegin ikki, at nakað nýtt er komið fram í málinum, síðan kanningin varð almannakunngjørd.

# Advokatar melda pass

**Tignin er farin, og inflatión er komin í. Tað halda advokatar, sum høvdu himprast við at gjørt eina kanning fyri løgtingið, um teir vórðu bidnir. Orsøkin er tann viðferð, sum kanningin av embætisførsluni hjá Jørgin Niclasen hevur fingið frá løgmanni**

KANNING
*Ingi Rasmussen*



*Tá kanningar verða lagdar omaná kanningar, til úrslitið er vorðið, sum tú vilt hava tað, so hava vit ein stóran trupulleika við kanningarháttinum, sigur Alfred Petersen, advokatur*

– Eg hevði ikki tikið av, sigur Alfred Petersen advokatur.

– Eg hevði verið ógvuliga betonkiligur, sigur Jógvan Páll Lassen advokatur.

Í kjalarvørrinum av kanningini av embætisførsluni hjá Jørgin Niclasen frábiðja advokatar sær at gera eina kanning fyri løgtingið eina aðru ferð. Orsøkin er tað eftirspælið, sum kanningin fekk í politisku kvørnini.

Tá kanningin, sum Turið Debes Hentze stóð fyri, varð liðug, varð hon fyrst kannað av Fiskimálaráðnum, sum sjálvt stóð fyri skotum, og síðan løgd út til ein eksternan advokat at hyggja ígjøgnum, áðrenn løgmaður tók støðu til, um Jørgin Niclasen hevði gjørt nakað skeivt.

Hetta undrast advokatarnir, sum Sosialurin hevur tosað við, stórliga um.

### Kanning omaná

Inflatión er komin í, heldur Alfred Petersen advokatur, sum er púra avgjørdur og hevði sagt nei takk til at verið kanningarstjóri fyri løgtingið.

– Trupulleikin er ikki, at advokatar verða settir upp ímóti hvørjum øðrum. Tað eru vit vanir við í okkara arbeiði. Men tá kanningar verða lagdar omaná kanningar, til úrslitið er vorðið, sum tú vilt hava tað, so hava vit ein stóran trupulleika við kanningarháttinum, og tað hevði eg ikki viljað verið partur av, sigur Alfred Petersen.

Í Dagblaðnum, málgagni Fólkafloksins, mánadagin verður harðliga lagt eftir Turið Debes Hentze persónliga og hennara kanning verður eitt nú kallað »eitt makkverk«.

– Ein advokatur má tola eitt sindur av hvørjum, men tað er keðiligt, um lagt verður eftir persóninum heldur enn málinum. Tað er ótrúliga keðiligt, um ein viðgerð av einari kanning, sum advokaturin er biðin um at gera, verður so ótýdlig. Tað førir bara til, at fólk ikki tíma eina aðru ferð, sigur Alfred Petersen.

Hann er formaður í Advokatfelag Føroya, men hann leggur dent á, at tað ikki er sum slíkur, at hann úttalar seg.

### Niðurbrótandi

Tignin er farin av hesum slagi av kanningum, og spælireglurnar eru brotnar. Tað heldur Jógvan Páll Lassen, sum ivast stórliga í, um hann hevði tikið av, um hann varð biðin um at kanna eitt mál fyri løgtingið.

Jógvan Páll Lassen vísir á, at ávísar spælireglur vórðu gjørdar, tá stýrisskipanarlógin varð smíðað, har løgtingsformaðurin eftir ávísum mannagongdum kann seta kanningar í verk av landsstýrinum. Tær spælireglurnar mugu haldast.

– Løgtingið hevur ein møguleika at seta ein kanningarleiðara, sum verður eitt slag av dómara í dystinum. Tá dysturin er liðugur, kann løgmaður ikki bara siga, at dómarin onki nyttaði og seta aðrar dómarar at døma. So verður onki skil á, sigur Jógvan Páll Lassen.

Hann hevur sjálvur ikki lisið frágreiðingina hjá Turið Debes Hentze, men tað er óviðkomandi, sum landið nú liggur, heldur hann.

– Tá vit hava so tignarliga skipan, har hægsti parlamentarikarin í landinum, løgtingsformaðurin, setir ein kanningarstjóra, so mugu vit hava álit á skipanini og taka ta niðurstøðuna, sum kanningarstjórin kemur við, til eftirtektar. Annars rýkur øll tignin og alt álit á skipanina. Hetta málið hevur niðurbrotið skipanina, sigur Jógvan Páll Lassen.



*Hetta málið hevur niðurbrotið skipanina, sigur Jógvan Páll Lassen, advokatur*

Turið Debes Hentze var annars eitt natúrligt val, heldur hann, tí tær stóru advokatskrivstovurnar eru ógegnigar í hesum málinum.

– Eg havi fult álit á, at løgtingsskrivstovan hevur mett skilagott um hesi tingini, sigur Jógvan Páll Lassen.

# Søguligt misálit ávegis

**Tá tingfundur verður týsdagin klokkan 14. januar 2003 klokkan 13.30 verður eitt søguligt misálit lagt fram. Tað bendi alt á mánadagin**

POLITIKKUR
*Ingi Rasmussen*

– Fer Jørgin Niclasen ikki frá áðrenn tingfundin, so leggja vit eitt misálit fram, staðfestir Lisbeth L. Petersen, forkvinna Sambandsfloksins.

Seinni um dagin skuldu Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin á fund at tosa um málið. Serliga hvønn misálitið skuldi vendast ímóti: Anfinn Kallsberg løgmanni ella Jørgin Niclasen landsstýrismanni.

Handan leiktjøldini stríddist samgongulimir hinvegin at sannføra Jørgin Niclasen um, at hann gjørdi rættast í at fara sjálvboðin, so tað slapst undan misálitinum.

Javnaðarflokkurin vil hava, at eitt misálit skal vendast ímóti landsstýrismanninum, so viðgerðin fer at snúgva seg um málið. Verður tað samtykt, er tað samstundis eitt misálit móti løgmanni, sum ikki hevur handlað í málinum, og tí kann hugsast, at hann stendur næstur á skránni, um landsstýrismaðurin rýkur.

Løgmaður hinvegin fer helst at vísa á, at hann hevur tikið støðu í málinum, tí hann hevur givið landsstýrismanninum fleiri ábreiðslur.

Stýrisskipanarlógin ásetir, at meira enn helmingurin av øllum tingmonnum, tað vil siga 17 tingmenn, skulu atkvøða fyri, um eitt misálit skal verða samtykt. Verður eitt misálit samtykt, skal løgmaður loysa viðkomandi landsstýrismann úr starvi. Er misálitið reist ímóti løgmanni, skal løgmaður biðja løgtingsformannin loysa seg úr embætinum.

Sambært tingskipanini skal eitt misálit leggjast fram skrivliga á løgtingsfundi. Skráin fyri løgtingsfundin verður tá alt fyri eitt broytt soleiðis, at hetta mál verður sett at vera næsta mál á sama fundi, og verður, tá umrøðan endar, farið beinleiðis til atkvøðugreiðslu á fundinum.

Tað er bara einaferð hent áður, at misálit er reist, síðan stýrisskipanarlógin kom í gildi í 1995. Tá reisti Jóannes Eidesgaard misálit móti Sámal Petur í Grund, landsstýrismanni, men tað fall.

Sum landið lá mánadagin, bendi alt á, at eitt misálit varð reist, men tað var ikki óhugsandi, at okkurt annað hendi í málinum, sum gjørdi, at alt verður sum vant á tingfundinum týsdagin. So er tað í staðin ES, sum er á lofti.



# Jenis væntar misálit

**Tingmanningin hjá Tjóðvelsisflokkinum var sera varin við at siga nakað um eitt møguligt misálit á Jørgen Niclasen, áðrenn flokkurin fór á fund í seinnapartin í gjár. Umboðið hjá Sjálvstýrisflokkinum, Kári P. Højgaard, stuðlar tó løgmanni, meðan Jenis av Rana úr Miðflokkinum sigur seg vænta eitt misálit**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*















Tað var ein sera hulin samgonga, sum gjørdi viðmerkingar til framtíðina hjá Jørgeni Niclasen sum fiskimálaráðharra, og fleiri av samgongulimunum, høvdu valt at sløkkja fartelefonina í gjár. Tí var trupult at fáa viðmerkingar um eitt møguligt misálit í gjár.

Eftir ætlan skuldi Tjóðveldisflokkurin hava fund í gjár klokkan 17. Sambært tjóðveldisfólki var hetta ein regluligur fundur, men eingin duldi fyri, at eitt møguligt misálit á Jørgen Niclasen var høvuðsmálið á fundinum.

Heini O. Heinesen í Tjóðveldisflokkinum var tó ein av teimum fáu, sum gekk við tendraðari fartelefon í gjár, og við Sosialin segði hann seg taka støðu í tingsalinum, men hann metti ikki, at Jørgen Niclasen hevði "tacklað hetta málið rætt", sum hann málbar seg.

– Tað er ikki problemið hjá Tjóðveldisflokkinum, at ein landstýrismaður hjá Fólkaflokkinum ger er í trupulleikum Men ein landstýrismaður er altíð í vanda, eisini um hann einki skeivt hevur gjørt, sigur Heni O. Heinesen.

### Tingsins trúvirði í vanda

Hann helt tað vera skeivt av Løgtinginum í síni tíð at samtykkja lógina um umskipan av lánum hjá fjarfiskaflotanum, tí hetta var tað sama sum at geva ein blankokekk, sigur Heini O. Heinesen, sum leggur dent á, at hann ikki atkvøddi fyri lógini. Hann heldur tí, at tað kundi skalað trúvirðið hjá tinginum, um atkvøtt varð fyri misáliti, tí tingið hevur jú sjálvt samtykt lógina.

Heini O. Heinesen metir, at Jørgen Niclasen hevur gjørt nógv, sum er nógv verri enn júst tað sum kanningin hjá Turið Debes Hentze fevndi um. Sum dømi nevnir tjóðveldistingmaðurin, tá ein norskur línubátur varð tikin inn í flotan á sinni. – Tá royndu eg og Jákup Sverri Kass at gera okkurt við málið, men eingi áhugi var fyri tí, sigur Heini O. Heinesen, sum kortini viðgongur, at tað broytir støðuna, tá eitt mál er viðgjørt av einum kanningarstjóra. Hann heldur, at tað er torført at finna niðurstøður í kanningini hjá kanningarstjóranum, og serliga orðingin í Stýrisskipanarlógini, sum ljóðar "eftir góðum umsitingarligum siði", verður mett ógvuliga individuelt, av tí sum skal taka støðu slíkum málum.

### Ein kanning er ikki ein dómur

Hinvegin er ein kanning hjá einum kanningarstjóra ikki ein dómur, sigur tingmaðurin úr Kunoy, sum sáa nakran iva í sambandi við sjálva kanningina. Men sum nevnt heldur Heini O. Heinesen hetta ikki vera nakað stórt mál samanborið við so nógv onnur. Men tað stóra í tí er kortini, at tað er farið til ein kanningarstjóra, sigur Heini O. Heinesen, sum heldur, at Jørgen Niclasen átti at lagt frá sær. Men hann leggur kortini afturat, at eingin fer væl av, at annar fer illa.

### Annita onga viðmerking

Hergeir Nielsen, tjóðveldismaður úr Suðuroy, vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til málið um Jørgen Niclasen. – Mín støða er greið. Nú má bera ella bresta hjá samgonguni. Men hendan samgongan hevur klárað so nógv higartil, at hon man eisini fara at klára hesa støðuna, sigur Hergeir Nielsen.

Hvørgin av tjóðveldiskvinnunum, sum eru valdar í Suðurstreymoy, Annita á Fríðriksmørk og Kristina Háfoss, vildu gera nakra viðmerking til Sosialin. Hetta er ein nýggj støða, tí áður hevur ljóðað, at Annita á Fríðriksmørk ætlaði at atkvøða fyri einum misáliti á Jørgen Niclasen. Men í gjár vildi hon altso einki siga, fyrr enn tingbólkurin hevði tosað saman á fundi.

### Kári P. Højgaard álit á løgmanni

Samgongan er mannað av fýra flokkum, harav tveir hava bert tann eina mannin.

Kári P. Højgaard í Sjálvstýrisflokkinum hevur onga tingmanning at fara á fund við, men sjálvur sigur hann, at úrslitið hjá kanningarstjóranum gongur ikki Jørgen Niclasen og umsiting hansara á møti. Her kundi málið verið avgreitt, um landsstýrismaðurin legði frá sær, men tað gjørdi hann ikki, og tí rullar bólturin nú sambært Kára P. Højgaard víðari til løgmann, sum gevur Jørgeni Niclasen tað gula kortið.

Óhefti trímannabólkurin, Julianna Klett, Sjúrður Horsdal og Anfinn V. Hansen, siga at einki skeivt er gjørt. Tað sama sigur Christian Andreasen, advokatur, sum sjálvstýristingmaðurin tó kallar ógegnigan, og tað metir hann vera sera keðiligt.

Kári P. Højgaard meldar púra greitt út, at kemur eitt misálitisuppskot niðan í tingið, er tað líka mikið, um tað er á landsstýrismannin í fiskivinnumálum ella á løgmann. Verður avgerð løgmans broytt til reytt kort í Løgtinginum er misálit eisini sett á embætisførslu hansara. Kári P. Højgaard hevur álit á løgmanni, og tekur avgerðina hjá honum til eftirtektar, men av tí at høvuðsyvirskriftirnar í fjølmiðlunum í seinastuni hava snúð seg um embætisførsluna hjá Jørgeni Niclasen, er trúvirðið minkað, og tí hava vit ein politiskan trupul leika. – Einasti, sum kann bøta um hendan trupulleika, er Jørgen Niclasen sjálvur, sigur Kári P. Højgaard.

Spurdur, um tað ikki er av tí, at Sjálvstýrisflokkurin ikki kann vera Fólkaflokkin fyri uttan, at hann ikki vil atkvøða fyri misáliti, sigur Kári P. Højgaard, at ta tíðina hann hevur sitið í samgongu, hevur løgmaður stýrt skútuni væl. Men hevði tað verið Kári sjálvur, sum var fiskimálaráðharri, hevði hann farið frá, sigur eysturoyartingmaðurin, sum gjarna hevði vil sleppa undan at vera partur av hesum trupulleikanum. Spurdur, um hann kann tað, svarar Kári P. Højgaard, at hetta málið fór fram áðrenn hansara tíð. - Men tjóðveldismenn hava ein stóran trupulleika í hesum døgum, sigur tann einsamalli sjálvstýristingmaðurin og sipar til mismun í uppsagnum av landsstýrismonnum.

### Jenis væntar misálit

Hin lítli flokkurin í samgonguni, Miðflokkurin, sendi um vikuskiftið Jørgeni Niclasen eitt "lítið og fitt" bræv, sum formaðurin, Jenis av Rana, málber seg í samrøðu við Sosialin. Í brævinum heitir Miðflokkurin á landsstýrismannin um at leggja frá sær, tí tað er samgongan og ikki andstøðan, sum skal ráða í Føroyum, sigur Jenis av Rana.

– Tí eigur Jørgen Niclasen at lata ein floksfelaga fáa landsstýrissessin. Løgmaður hevur tikið eina juridiska avgerð, men hann átti eisini at tikið eina politiska avgerð sum samgonguleiðari. Hetta er eingin katastrofa, og miðflokkurin og samgongan hava nógv stórmál, sum skulu fremjast, sigur tingmaðurin hjá Miðflokkinum.

Hann vil ikki avdúka, um hann atkvøður fyri einum møguligum misáliti. – Men eg vænti, at meiriluti verður fyri tí, sigur Jenis av Rana at enda.

Tingfundur verður í dag kl. 13.30, og tá verður politiska lagnan hjá Jørgeni Niclasen helst avgjørd.

Sosialurin
Sosialurin
i

CISV
ALTJÓÐA BARNALEGUR

25 ár



...eru liðin síðani teir fyrstu føroyingarnir Kristjan, Elsa, Jóan Petur og Eyð luttóku á Altjóða Barnalegu í Noreg.

Síðan tá hava ímóti 500 børn og ung umboða okkum í altjóða tiltøkum kring heimin.
Í hesum felagsskapi hava børn og ung møguleikan at uppliva nakað heilt øðrvísi – skapa vinarbond og bera um fólk og mentanir í øðrum londum.

Ert tú 11 ár, og hevur hug og tori at fara heimanífrá í 4 vikur, hevur tú møguleika at sleppa á legu í summar. Føroysk børn fara at luttaka á legum í Brasilia, Kanada, Finland, Frankaríki, Noreg. Tvær gentur og tveir dreingir og ein leiðari eru í hvørjum bólki.

Ungleiðarir - JC, ið skulu vera 16 - 17 ár, fara á legur í Noreg og USA.

Legur fyri 13-14 ára gomul verða í Føroyum, Egyptalandi og Íslandi. Á legunum hava fýra ung og ein leiðari úr Føroyum, saman við 6 øðrum londum, høvi at luttaka.

Seminar legur eru fyri 17–19 ára gomul og kunnu føroysk ung luttaka á legum í Eysturíki og Svøríki.

Interchange við Italia. Ein bólkur við 10 ungum í aldrinum 12–13 ár úr hvørjum landi eru saman 1 mánaða. Ein 1/2 mánað í hvørjum landi bæði heima hjá hvørjum øðrum og á legum.

Íslandsferð á páskum í 10 dagar fyri ung í aldrinum 12 – 14 ár.

Leiðarar
Eisini verður søkt eftir leiðarum. Hevur tú hug og dirvi at fásast við børn, ert í minsta lagi 21 ár og vil sleppa út í stóru verð, er hetta eitt gott høvi at royna seg í altjóða hópi. Foreldrini gjalda útreiðslur og ferðakostnaðin hjá leiðarunum.
Til tykkum, ið hava hug at verða leiðarir, fáa nærri at vita við at venda sær til Mallu Dam á telefon 31 16 96.

Heldur tú, at hetta er nakað fyri teg, fært tú umsóknarblað, um tú sendur eitt kort við navni og bústaði tít

CISV - Altjóða Barnalegur
Undir Borgarhálsi, 176 Velbastað
Freistin at søkja er 27. januar